STEPHANSSONS HÚS

# NÝGGJ HÚS Á HEIÐUM Í HOYVÍK



Ein heilskapaður býlingur – við handilsgøtuni Karlamagnusarbreyt, sum strekkir seg frá Húsunum á Heiðum og oman til torgið við nýggju kirkjuna, spildurnýggjum skúla og barnaansingarstovni.

Húsini á Heiðum eru 10 lonir við 4 ymiskum íbúðarsniðum.

Hvørt hús hevur urtagarð, umframt at økið framman fyri húsini er skipað sum fríøki  við ongari ferðslu.

Ùthús er til hvørja íbúð á fríøkinum frammanfyri og 2 bilstøðlar.

Húsini á Heiðum eru arkitektteknað, og størsti dentur er lagdur á góðskuna. Húsini eru úr timbri og eru klødd uttan við annað hvørt skiferplátum ella við vatnrøttum timbri. Altan úr stáli er í hvørjum húsi.

Gólv í gongd, WC og vátrúminum á niðaru hædd eru flísar. Vátrúm á hinum hæddunum hava vinýl á golvinum.

Parkettgólv er í stovu, køki og kømrum.

**RING 315060**

J&K



